# Til minnis um Terja Simonsen



Góði Terji.

Nú eru fimm mánaðir síðani tú varð tikin frá okkum. Ilt er at fata, at tú er ikki ímillum okkum longur. Okkum untist bara átta ár saman við tær. Har tú nú er staddur, hevur tú tað gott. Eftir sita vit spyrjandi; hví skuldi sjúkan raka so meint? Vit fáa einki svar. Tú fylti nógv í gerandisdegnum, tí kennist saknurin svárur. Sólglæma okkara er slóknað. Terji – tú var so glaður fyri lívið! Tú vildi øllum so væl, eisini tá ið tú sjálvur var viknaður av sjúkuni.

Terji, tær dámdi so væl at koma til okkara í Onnugøtu. Har føldi tú teg heima. Altíð møttu vit tær positivan og kerligan. Minnini eru góð, sum vit hava eftir teg, Terji, og tey verða okkara barlast fyri at koma víðari.

Nú páskirnar eru farnar aftur um bak, rennur mær til hugs, hvussu inniliga tú ynskti at vera heima páskirnar árið fyri, men lagnan vildi tað øðrvísi. Vit eiga onnur kær páskaminni um teg, tá ið tú so fittur og hugagóður stákaðist við at tekna, klippa og pynta.

Maria, Atli, Høgni og øll avvarðandi hava mist nakað so dýrabært, at orð kennast fátøk. Tit vóru so positiv, sterk og fyrimyndarlig, tá ið harðast leikaði á, tað hjálpti øllum so væl, sum vóru um tykkum.

Terji, takk fyri góð minni!

**Sigrid mostir**

*Deyðin er ikki tað seinasta, eg eri bara farin um sýnina*
*Eg eri eg, og tú ert tú. Tað, sum vit áður vóru fyri hvør øðrum, tað eru vit enn.*
*Nevn meg við navni, nýt mítt yndisnavn, práta við meg um leyst og fast, sum vit altíð gjørdu.*
*Lat røddina vera hina somu, hóast sorg og sakn.*
*Flenn, soleiðis sum vit vóru von at flenna saman at onkrum skemtiligum.*
*Hugna tær, brosa, hugsa um meg, bið fyri mær.*
*Lat navn títt framvegis hoyra uppí okkara húski.*
*Tala um meg natúrliga, ikki við gráturødd.*
*Lívið er framvegis dýrabært; tað er, eins og tað altíð var; tað heldur fram øld eftir øld.*
*Deyði og lív hoyra saman.*
*Hví skuldi eg farið úr huga, um eg fór úr eygsjón?*
*Eg bíði bara eftir tær, um eina stund, onkustaðni her í nánd, aftan fyri sýnina.*
*Alt er, sum tað eigur at vera.*




lærlingur
til kolonialdeildina

MIKLAGARÐUR Í SMS SÓKNAST EFTIR EINUM KOLONIALLÆRLINGI AT BYRJA 1. JULI 2003

Í lærutíðini skal tú á 14-daga skeið, 4 ferðir í lærutíðini.

- Hevur tú FHS-prógv er lærutíðin 3 ár.
- Hevur tú HH-prógv er lærutíðin 2 ár.
- Hevur tú students- ella HF-prógv er lærutíðin 2 ár og 18 vikur í skúla.

Eitt læripláss á kolonialdeildini gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari menning og tínir framtíðarmøguleikar eru fleiri.

*Ljóðar hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn - innan 2. juli 2003 - við møguligum prógvum og tilmælum til Miklagarð. Tú kanst eisini seta teg í samband við Johnny Priess, um tú vilt hava meira at vita um útbúgvingina.*



lærlingur
til slaktara

MIKLAGARÐUR Í SMS SÓKNAST EFTIR EINUM SLAKTARALÆRLINGI AT BYRJA 1. JULI 2003

Í lærutíðini kemur tú at arbeiða hjá slaktarinum í Miklagarði í SMS og fært høvi at royna eitt sindur av hvørjum.

- Lærutíðin er 4 ár.

Eitt læripláss hjá slaktarinum gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari menning og tínir framtíðar-møguleikar eru fleiri.

*Ljóðar hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn - innan 2. juni 2003 - við møguligum prógvum og tilmælum til Miklagarð. Tú kanst eisini seta teg í samband við Jørgen Jørgensen á tlf. 31 52 62, um tú vilt hava meira at vita um útbúgvingina.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 38 11






www.sosialurin.fo



**MPV TIL SØLU**
Nissan Prairie, árg. 94, TÝSKUR bilur, svartur, bakhurðar langsgangandi, sportfelgur, sóltak, 2 sett av dekkum, sóltak, el-rútar og sentrallás.
SKAL SÍGGJAST!
EINANS kr. 110.000 v/ mvg

**tlf. 224910**





**Hátrýstvaskarin!**



**Ring 42 31 11**




# Eitt hervald krevur lógir

**Hervaldið í Føroyum kann ikki virka uttan danskar lógir, og tí er tað undirornað, hvat løgtingið sigur. Tað ger danski verjumálaráðharrin føroyingum púra greitt í spurninginum um, hví løgtingið ikki varð spurt eftir, áðrenn harnaðarlógirnar vórðu settar í gildi**

VERJUMÁL
*Ingi Rasmussen*



*Danski herurin í Føroyum krevur lógir at virka eftir, og tí vóru hernaðarlógirnar dagførdar, sigur Svend Aage Jensby (vm.), sum her sæst í práti við Georg Robertson, NATO-aðalskrivara*

Danski verjumálaráðharrin er ikki at vika.

Hernaðarligu revsi- og rættargangslógirnar skulu vera galdandi í Føroyum. Uttan mun til hvat Føroya løgting heldur.

Tað gjørdi hann púra greitt, tá Fólkatingið mikudagin viðgjørdi uppskotið hjá Tórbirni Jacobsen, fólkatingslimi, um at taka hernarðarlógirnar av aftur.

Løgtingið samtykt einmælt í mai mánað at heita á donsku stjórnina um at strika hernaðarlógirnar. Í 2001 samtykti løgtingið eisini, at gomlu hernaðarlógirnar frá 1937 skuldu takast av, og ongar setast í staðin. Men hóast hetta setti danska stjórnin nýggju hernaðarligu lógirnar í gildi fyri Føroyar av sínum eintingum.

Tað var tvingandi neyðugt, segði verjumálaráðharrin í Fólkatinginum.

– Bæði hendan og undanfarna stjórnin vildu hava eina dagføring av hernaðarligu lóggávuni í Føroyum, so at hon svarar til ta lóggávu, sum vit hava í Danmark. Stjórnin heldur ikki, at økið kann liggja uttan ta serligu hernaðarligu lóggávuna, sum tørvur eisini er á í Danmark. Út frá fólkarættarligu grundreglum áliggur tað eisini donsku stjórnini at hava eina innanhýsis hernaðarliga revsiskipan, sum landsins hervald livir undir, sigur Svend Aage Jensby, verjumálaráðharri.

Verjumálaráðharrin vísir samstundis á, at Danmark í verjuhøpi er undirskipað altjóða samtyktum og avtalum, og tá hervald er staðsett í Føroyum, noyðist hernaðarliga revsilógin eisini at hava gildið í landinum.

Hann vísti annars aftur, at talan er um eitt eindømi, at danska stjórnin setir lógir í gildi fyri Føroyar uttan at hava fingið samtykt løgtingsins fyrst. Hann vísti til, at lógin um »dansk indfødsret«, lóg um danskar tænastumenn og lógin um danska tjóðbankan virkar í Føroyum, uttan at løgtingið hevur givið loyvi.

Annars segði danski verjumálaráðharrin enn einaferð, at hann boðaði Anfinn Kallsberg løgmanni frá, at hann vildi hava dagført lógirnar um hervaldið í Føroyum. Men hann gjørdi samtundis púra greitt, at talan var bara um eina kunning, og at løgmaður ongantíð hevði givið nakra heimild at seta lógirnar í verk fyri Føroyar.

# Fingu onki forstáilsi í Fólkatinginum

**Fólkatingið tekur ikki undir við at taka hernaðarlógirnar, sum vóru lýstar fyri Føroyar ímóti løgtingsins vilja, av aftur. Danskir politikarar vísa á, at stjórnin hevur einaræði á verjuøkinum, og at lógirnar mugu vera eins fyri ríkið**

VERJUMÁL
*Ingi Rasmussen*

Føroysku fólkatingslimirnir komu aftur úr Danmark sum av torvheiðum eftir viðgerðina í Fólkatinginum mikudagin.

Bara Eindarlistin og SF søgdu seg taka undir við uppskotinum um at taka nógv umrøddu hernaðarlógirnar av fyri Føroyar. Flokkarnir Vinstra, konservativu, Dansk Folkeparti, radikalu, Kristeligt Folkeparti og sosialdemokratarnir vóru allir ímóti.

Sostatt er líkt til, at uppskotið hjá Tórbjørn Jacobsen, sum eitt samt løgting stendur aftanfyri, fellur við einum braki, tá tað kemur aftur úr nevnd.

## Ein royndarsteinur

Søgan um hernaðarlógirnar er long. Men síðsti parturin av søguni er vorðin eitt prinsippmál fyri føroyingar. 27. mars 2003 kunngjørdi stjórnin umvegis ríkisumboðið av sínum eintingum nakrar hernaðarligar revsi- og rættargangslógir fyri Føroyar. Uttan at løgtingið varð kunnað. Hetta er eitt brot við vanliga siðvenju, sum sigur, at lógir, ið viðvíkja Føroyum, verða lagdar fyri løgtingið til álitis. Tað tilskilar grein 7 í heimastýrislógini, eins og stýrisskipanarlógin sigur, at øll ríkislóggáva skal gjøgnum vanligu politisku viðgerðina í Føroyum.

Eftir hetta legði Føroya Javnaðarflokkur fram eitt uppskot til ríkislógartilmæli fyri løgtingið um, at lógirnar skuldu takast aftur. Allir flokkar atkvøddu fyri uppskotinum tann 2. mai 2003. Sostatt varð tað eitt einmælt løgting, sum kravdi lógirnar tiknar av aftur.

Harvið er málið um hernaðarlógirnar vorðið ein royndarsteinur fyri viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Løgtingið reisti seg ímóti stjórnini og gjørdi greitt, at ongin ríkislóg skal setast í gildi, uttan at lóggevandi valdið í Føroyum er spurt eftir og hevur samtykt tað fyrst.

## Virðing og álit

Bæði Tórbjørn Jacobsen og Lisbeth L. Petersen gjørdu sítt til at sannføra danskar politikarar um týdningin av, at lógir ikki verða kroystar niður yvir føroyingar.

Tórbjørn Jacobsen bað Fólkatingið um at »normalisera« viðurskiftini aftur millum Føroyar og Danmark og at hjálpa stjórnini burtur úr kreppuni millum londini við at lata alt málið ganga umaftur.

– Ríkið liggur í tykkara hondum. Danska stjórnin hevur gjørt eitt klokkuklárt lógarbrot, og tað kann eitt lóggevandi ting ikki lata fara aftur við borðinum. Nú má handlast. Bæði fyri Danmarkar og Føroya skuld og fyri Ríkið, um tað er tað, man vil, segði Tórbjørn Jacobsen, sum minti á orðini um »gensidig respekt«, sum so ofta hava verið at hoyra.

Hóast Lisbeth L. Petersen var meiri tvíkend í sínari talu, so varð boðskapurin á leið tann sami. Framferðarhátturin var skeivur, tá hernaðarlógirnar vóru lýstar uttan um løgtingið.

– Fyri okkum er prinsippið um, at løgtingið skal kunnast, tað avgerandi í hesum máli, og vit vilja, at heimstýrislógin skal virðast. Heimastýrislógin er ikki bara løgfrøði. Hon er eisini ein politisk avtala, sum fyri okkum í Sambandsflokkinum byggir á sínámillum virðing og álit. Tað er framferðarhátturin, sum vit eru ímóti, og sum vit vilja tryggja okkum ikki verður brotin, segði Lisbeth L. Petersen.

Hon var kortini trúgv ímóti donsku stjórnini og sínum systirflokki Vinstra og atkvøður neyvan fyri uppskotinum. Hon segði seg hava fingið lovað, at hendan søgan fór ikki at endurtaka seg.

## Eins lógir

Hvussu er og ikki. Danskir politikarar lótu ikki við seg koma, og tað tykist greitt, at ein greiður meiriluti av Fólkatinginum atkvøður ímóti uppskotinum at taka hernaðarlógirnar av.

Sjónarmiðið er, at lógirnar fyri donsku verjuna mugu vera eins fyri alt tað danska ríkið, og at hetta er eitt málsøki, sum danska stjórnin einsamøll hevur ræðið á. Tað søgdu bæði Vinstra, konservativu, sosialdemokratarnir og hinir flokkarnir.

Tað var bara Søren Søndergaard úr Eindarlistanum, sum heilhjartaður talaði føroysku sjónarmiðini. Hann skilur væl, at føroyingar kenna tað sum eina provokatión, at danska stjórnin setir lógir í gildi fyri Føroyar uttan at spyrja føroyingar eftir. Tað er rættast at viðgera alt málið av nýggjum, helt hann, men lítli flokkurin ytst á vinstraveinginum fekk onga undirtøku frá teimum, ið sita við valdinum.

Málið er beint í politisku og búskaparligu nevndina.

**Fakta**

**Heimastýrislógin §7:**

Fyri at vissa, at Løgtingið fær mest møguliga ávirkan á, hvussu serligar ásetanir fyri Føroyar í lógum, sum ríkisvaldið gevur, verða skipaðar, skulu stjórnaruppskot, ið innihalda ásetanir, ið bert viðvíkja Føroyum, leggjast fyri føroyska heimastýrið til álitis, áðrenn tær verða settar fram fyri ríkisdagin.

Annars skulu ríkislógir, sum viðvíkja lokalum føroyskum viðurskiftum, leggjast fyri føroyska heimastýrið til álitis, áðrenn tær verða settar í gildi í Føroyum. Freist kann í hvørjum einstakum føri verða sett fyri tíðina, tá álitið frá heimastýrinum skal vera liðugt. Hevur tann í hesum petti nevnda fyriløga vegna átroðkandi viðurskifti ikki kunna farið fram, skal lógin skjótast verða send heimastýrinum til ummælis.

Á sama hátt verður framfarið viðvíkjandi sáttmálum og øðrum internationalum semjum, sum krevja ríkisdagssamtykt, og sum nerta við serlig føroysk áhugamál